

# Josias Matras í Smiðjuni

Millum teir 40 málingarnar á framsýningini hjá Josiasi Matras í Smiðjuni í Lítluvík er ein røð við Grindadrápi sum myndevni. Í øðrum myndum hevur listamaðurin leitað sær íblástur hjá S.J Mykines, eitt nú í oljumálninginum "Jarðsetur". Við á framsýningini eru bæði tekningar, vatnlitsmyndir og oljumálingar, og eru flestu verkini gjørd í ár. Longu áðrenn framsýningin lat upp, fekk listamaðurin ein heldur óvæntaða vitjan. Tað var eysturríski sendiharrin, sum kom á gátt í Smiðjuni og alt fyri eitt keypti eina av myndunum. Opið er hvønn dag fram til týsdagin 15 oktobur frá kl. 14.00-18.00. Tó er opið leygardagin frá klokkan 10.00 til 17.00.

# Tríggir tiknir fyri rúsdrekkakoyring

**Løgreglan fangaði tríggjar bilførarar í at koyra við kenning hetta vikuskiftið**

LØGREGLURAPPORTIN
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



Tríggir mans hava meir ella minni spælt sær av við koyrikortið hetta vikuskiftið fyri at koyra við kenning ella fyri spirituskoyring.

Ein bilførari varð tikin umleið klokkan hálvgum eitt í Hoyvík fyri at koyra við kenning. Klokkan hálvum fimm somu náttina steðgaði løgreglan einum bili mitt í Havnini, og vísti tað seg at vera enn ein ávirkaður bilførari. Hvørt talan var um promillu- ella spirituskoyring hjá hesum báðum, verður ikki nevnt í rapportini, men er talan í øllum førum um ávirkan omanfyri 0,5 promille.

Tann triðji í røðini varð tikin í Klaksvík sunnunáttina beint eftir midnátt. Hesin koyrdi við meira enn einari kenning, also spiritus-koyring.

Seinni fekk løgreglan í Klaksvík fráboðan um, at ein maður var til ampa inni í »Maverick« í Klaksvík, og talan vísti seg at vera um sama mann. Tá løgreglan kom á staðið, hevði hann tó gjørt seg til at fara avstað, og tað var tí ikki neyðugt at hjálpa honum til hús.

Í Klaksvík var eisini ein fráboðan um stuldur. Um klokkan fýra leygardagin fekk løgreglan eina fráboðan um at ein pengakassi var stolin frá eini fyritøku í Klaksvík. Illgruni var um ein persón, at hesin skuldi hava framt stuldurin, og tá løgreglan setti seg í samband við viðkomandi, játtaði hesin seg so sekan í stuldrinum.

# Eldur í húsum í Sumba



**Umleið klokkan 18.30 fríggjakvøldið fekk alarmsentralurin fráboðan um nógvan royk í einum húsum í Sumba. Fyribilskanningar vísa, at eldurin kyknaði í køkinum**

LØGREGLURAPPORTIN
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Sumbingar fingur ein størri hvøkk fríggjakvøldið, tá knappliga sást nógvur roykur úr einum húsum, miðskeiðis í bygdini, beint uttanfyri samkomuhúsinum. Fólk í bygdini boðaðu beinanvegin frá nógva roykinum, og boð vórusendeftirsløkkiliðnum.

Talan er um eini gomul hús, sum vórðu bygd fyrst í 20. øld, og húsini fingu stóran skaða av eldinum.

Sløkkiliðið kom á staðið stutt eftir fráboðanina, og fingu sløkt eldin áðrenn húsini brendu í grund, men løgreglan upplýsir at nakað fitt av eld og roykskaða var.

Ein maður, sum býr í húsinum, varð stutt undan farin út úr húsinum, og eingin mannskaði stóðst av eldinum.

Fyribilskanningar vísa, at eldurin kyknaði í køkinum, men enn er orsøkin ikki staðfest. Brandkøn fólk eru farin úr Havn til Suðuroyar í morgun, til tess at fáa staðfest orsøkina til at eldurin kyknaði.

# 15 ára gamal koyrdi uttan koyrikort

**Ein 15 ára gamal drongur ætlaði eftir øllum at døma at síkja seg við bili eftir Oyggjarvegnum til Havnar, men varð tikin á búri í Kollfjarðadali**

LØGREGLURAPPORTIN
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Umleið klokkan tvey leygarnáttina varð steðgaði løgreglan einum bili í Kollfjarðadali, heimanfyri Royndarstøðina hjá MBM. Tað vísti seg at verða ein heldur ungur førari av bilinum, nevnliga ein bert 15 ára gamal drongur.

Drongurin hevur bústað í Havn, og bilurin varð skrásettur til somu addressu í Havn, og var tað eftir øllum at døma bilurin hjá foreldrunum, hann hevði síkt seg avstað við.

Løgreglan upplýsir, at hann helst hevði í hyggju at síkja seg eftir Oyggjarvegnum til Havnar, til tess at vekja sum minst av ansi. Men hetta eydnaðist í øllum førum ikki, og ungi drongurin varð tikin á búri í bilinum hjá foreldrunum.

Løgreglan upplýsir eisini, at ungi drongurin ikki var ávirkaður av rúsdrekka.

# Fingu fleiri fráboðanir um leyst byggitilfar

**Løgreglan hevur um vikiskiftið fingið fleiri fráboðanir um leys ting, sum eru fokin í nógva vindinum um vikuskiftið**

LØGREGLURAPPORTIN
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið hevur nógvur vindur verið, og løgreglan hevur fingið fleiri fráboðanir um leys ting, sum hava fokið aftur og fram í nógva vindinum. Serliga er talan um byggitilfar, sum liggur leyst í samband við nýgerð av húsum ymsastaðni.

Fráboðanirnar um hesi tingini komu bæði fríggjadag og leygardag, og tá nógv bygging er í landinum fyri tíðina, er vandin fyri at byggitilfar liggur leyst, sera stórur.

Einki verður fráboðað um skaða, sum er staðin av at leys ting eru fokin við vindinum.

Aðrastaðni í býnum varð boðað frá smávegis herverki og onkrum húsaófriði, men hetta var í tí mildara endanum, verður sagt av politistøðini í Havn.

Nøkur fólk vórðu eisini hjálpt til hús í vikuskiftinum, men eingin hevur sovið rúsin av sær á støðini hetta vikuskiftið, upplýsir vakthavandi.

# Stóðu føst í elevatori

**Nøkur fólk, sum høvdu leita sær oman í býin í Havn leygarkvøldið, sluppu eina løtu at halda eina lítla veitslu fyri seg sjálvi, nevnliga inni í elevatorinum, sum steðgaði upp**

LØGREGURAPPORTIN
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Sunnunáttina, nakað yvir klokkan tvey, fekk løgreglan í Havn fráboðan um ein elevator í klubbanum, sum hevði sett seg fastan. Inni í elevatorinum vóru nakrir gestir, sum høvdu leitað sær oman í býin í illveðrinum leygarnáttina.

Sløkkiliðið varð boðsent at fáa fólkini úr elevatorinum aftur. Í okkurt um tjúgu minuttir stóðu gestirnir fastir inni í elevatorinum, áðrenn eitt starvsfólk í Klubbanum fekk latið hurðina upp og hjálpti gestunum út aftur. Hetta varð áðrenn sløkkiliðið kom á staðið, og vórðu teir tí sendir til hús aftur.

Sostatt fingu hesir gestirnir eina lítla løtu fyri seg sjálvar, áðrenn teir sluppu at halda fram við veitsluni hetta kvøldið.